

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 05 - 2012

# Total hevur tett lekan í Norðsjónum

Franska oljufelagið Total hevur nú tett gasslekan á Elgin-pallinum, sum er góðar 130 fjórðingar úr Aberdeen. Týsdagin varð farið undir at pumpa tunga evju niður í brunnin, og 12 tímar seinni bleiv staðfest, at lekin var tettur. Total segði í síðstu viku, at gasslekin fer at kosta felagnum millum 1,7 og 2,3 milliardir krónur í mistari framleiðslu og umvælingarútreiðslum. Gasslekin á Elgin-pallinum byrjaði tann 25. mars. Hetta er ikki tann einasti lekin, sum franska felagið hevur havt at stríðast við, tí ein gasspallur í Nigeria lekur eisini. Total væntar, at hann lekin verður tettur fyrsta dagin.